## Erla brotið fótin



Føroyski landsliðsmálverjin, Erla Eliasen, sum í summar skifti til TST í donsku 1. deild, noyðist nú at halda ein steðg við hondbóltinum. Á heimasíðuni hjá TST upplýsir felagið, at Erla hevur brotið eitt bein í fótinum, og at hon tí verður úti í nakrar vikur. Á heimasíðuni ber felagið annars stórt rós til Erlu, sum veruliga tykist hava gjørt vart við seg fyrstu tíðina í TST, har hon veruliga hevur bitið seg fasta í hópin.

## Ljósstein-systrar til Fredericia

Seinastu tíðina hevur Svein Rógvi Nielsen verið annar av venjarunum hjá danska Fredericia, og tað er helst fremsta orsøkin til føroyska styrkin, sum felagið nú fær. Uttan fyri vøllin hava Svein Rógvi og Annika nevnliga verið saman í eini 12 ár. Men tað verður nú fyrst og fremst fyri at spæla hondbólt, at tær báðar systrarnar nú fara at royna seg hjá FHK. Annika, sum er 33 ára gomul, hevur áður roynt seg í donskum hondbólti í bæði Odense og í Viborg. Durita er 18 ára gomul, og eisini hon hevur verið í Viborg, har hon seinnu árini hevur gingið á ítróttaháskúla.Báðar hava tær sína hondbóltsuppaling í Stjørnuni, har foreldrini bæði eisini eiga nógvar tímar bæði á og uttan fyri vøllin.

# Fingu búmerki og sáttmála

**Í seinastu viku fekk nýggja samanlagda Suðuroyar Svimjifelag nýtt búmerki. Samstundis varð sponsoravtala undirskrivað við Suðuroyar Sparikassa**




*Nýggja svimjifelagið í Suðuroy var fyri fyrstu ferð í kapping um vikuskiftið, tá tey vístu seg sum sterkasta felagið í kappingini í Klaksvík*

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá avgerð varð tikin um at leggja Vágs og Tvøroyrar Svimjifelag saman í eitt felag, varð búmerkjakapping samstundis útskrivað. Inn komu um 20 uppskot, og av hesum varð tað hjá Gunnari Hansen av Toftum valt sum tað besta. Sjálvt leggur felagið dent á, at nýggja búmerkið er einfalt, samstundis sum tað við ímyndaða svimjaranum greitt sýnir, hvat felag talan er um.

Samstundis, sum nýggja búmerkið varð avdúkað, skrivaði felagið undir sponsorsáttmála við Suðuroyar Sparikassa. Avtalan er galdandi fyri næstu tvey árini, og fegnast felagið um, at tey við hesum hava lagt lunnar undir eitt sterkt fíggjarligt grundarlag í felagnum.

## U17-hópurin úttikin

Pætur S. Clementsen og Finn Johannesen hava tikið út bruttohópin, sum seinastu vikuna av oktober mánaði skal til Týsklands at taka lut í EM-undankappingini fyri U17-landslið. Fyrstu venjingarnar verða í Havn komandi vikuskiftið, og hava venjararnir úttikið hesar spælarar til bruttuhópin: Hallur Hansson, Kristin R. Mouritsen, Rógvi Sørensen, Jógvan S. Nolsøe HB, Teitur Gestason, Sørmund Kalsø, Helgi Samson, Jan Elmar Sørensen, Dánjal Pauli Lervig, Ivan Joensen KÍ, Hugin Albinus, Heini Vatnsdal, Gilli Sørensen, Hanus Mortensen, Mikal Jespersen VB/TB, Róaldur Jacobsen B36, Monrad H. Jacobsen NSÍ, Eli Nielsen, Bjarti Hansen FSV04, Jens M. Jensen, Brynleif Hansen, Hans Joensen EB/ST, Per Gregersen, Petur G. Dalbø; Arnar Dam, Sam Bjartalíð GÍ/ÍF/LÍF, Høgni Midjord B71, Alex Mellemgaard AB.

**-mørk**

# Rosenborg nær sensatiónini

**Í hálvan tíma var Rosenborg á odda í dystinum á Stamford Bridge, men Andriy Shevchenko bjargaði enska stórfelagnum undan heilt stóru eyðmýkingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Miika Koppinen hevur lagt Rosenborg á odda í dystinum á Stamford Bridge, og sjálvandi er fagnaðurin í hvítklæddu spælarunum stórur*

*Mynd: Polfoto/AP*

Í gjárkvøldið varð Champions League blást ígongd. Og longu fyrsta umfarið var um reppið, at talan gjørdist um eina heilt stóra sensatión.

Norska Rosenborg var á vitjan hjá Chelsea, og eftir 24 minuttum fekk Miika Koppinen heimaáskoðararnar at tagna, tá hann sendi bóltin í meskarnar.

Chelsea hevur havt trupulleikar av skaðum seinastu tíðina, og hóast teir royndu at trýsta, so tóktist álopið dekan ov tannleyst, nú Didier Drogba ikki er partur av hesum. Níggju minuttir eftir steðgin megnaði Andriy Shevchenko tó at bjarga Chelsea undan ringastu eyðmýkingini, men 1-1 á heimavølli móti norsku meistarunum er neyvan nóg mikið til høgt strembandi London-felagið.

Aðra staðni í Europa løgdu siðvandu Real Madrid og Milan til brots við hvør sínum 2-1 sigri á heimavølli, meðan Liverpool fekk eitt væl brúkiligt úrslit við 1-1 javnleiki á útivølli móti Porto.

**Úrslitini týskvøldið**

| | |
|---|---|
| Porto-Liverpool | 1-1 |
| Marseille-Besiktas | 2-0 |
| Chelsea-Rosenborg | 1-1 |
| Schalke04-Valencia | 0-1 |
| Olympiakos-Lazio | 1-1 |
| Real Madrid-Werder Bremen | 2-1 |
| Milan-Benfica | 2-1 |
| Shakhtar Donetsk-Celtic | 2-0 |

## Trivaligur B36 sigur

B36 kvinnurnar vunnu týskvøldið trivaligan 5-0 sigur á heimavølli ímóti GÍ. Støðan eftir 1. hálvleik var 2-0. Ása Dam á Neystabø við brotssparki og Heidi Sevdal skoraðu málini í 1. hálvleiki. Í 2. hálvleiki skoraði Súsanna Hansen eina ferð, og Unn Kragesten gjørdi tvey mál.

EB/Streymur spældi síðsta landskappingardystin í hesum kappingarárinum, tá ið AB týskvøldið vitjaði. AB vann 1-0. Málið skoraði Bjørg Syderbø, tá ið eitt korter var eftir.

Støðan undan síðsta umfarinum, sum verður leygardagin, er tann, at KÍ og B36 hava 38 stig. Málmunurin hjá KÍ er +45, og málmunurin hjá B36 er +33. GÍ hevur 15 stig, og AB og EB/Streymur hava 8 stig. Málmunurin hjá AB er -27, og málmunurin hjá EB/Streymi er -30.

Leygardagin spæla GÍ og KÍ í Gøtu og AB og B36 á Argjum. Um KÍ megnar at vinna í Gøtu, er einki annað hugsandi, enn at klaksvíkskvinnur tryggja sær 8. FM heitið á rað, og at B36 vinnur silvur. GÍ hevur longu tryggjað sær bronsumerkini.

**-mørk**